Bilar

Nr. 103 • fríggjadagur • 3. juni 2005 • 79. árg.

*Teir sokallaðu London Taxi í nýggjari útgávu og í ymiskum litum*




# Tvídekkarar og London Taxi í Edinburgh

*Nógvir tvídekkarar við ongum taki á ovaru hæddini koyrdu runt í býnum við ferðafólki. Her við tveimum trýhjólaðar súkklum frammamfyri*






*Hans Kárason Mikkelsen frá Sosialinum við rattið á einum Bentley Continental GT. Hans dámar annars best Ferrari*



*Mercedes-Benz CLS er ein coupé við fýra hurðum. Ein sera snøggur bilur*

**Seinasta leygardag vóru fleiri av starvsfólkunum á Sosialinum á útferð í Edinburgh. Har var nakað fyri øll, eisini tey sum høvdu áhuga fyri bilu**

BILAR
*Tekstur og myndir*
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eins og í flestu býum í Stórabretlandi er býarmyndin í Edinburgh eyðkend av tvídekkarum (bussar í tveimum hæddum) og teimum kendu "London Taxi".

Meðan konufólkini kanska vóru mest áhugaði í at keypa í stóru handilshúsunum, gingu menninir fylgdu við í ferðsluni.

Har vóru nógvir flottir bilar at síggja. Bretar eru jú kendir fyri sínar sports- og luksusbilar.

Eisini koyrdu nógvir tvídekkarar við ongum taki á ovaru hæddini. Hesir koyrdu runt í býnum við ferðafólki.

Hýruvognarnir settu eisini sín serliga dám á býin - teir sokallaðu London Taxi í nýggjari útgávu og í ymiskum litum.




*Snorri Brend, blaðmaður, kundi nokk hugsað sær hendan Mercedes-Benz CLS 350 til rullandi redaktiónina*



*Nýggi kunningarleiðarin í Vágum, Edvard Joensen, við ein Bentley Continental GT, sum stóð í floghavnini í Edinburgh. Møguleiki var at vinna bilin, sum í Danmark kostar næstan 4 milliónir krónur*